## Julian vann aftur



Uppflytingararnir úr Svendborg hava tikið flest øll á bóli í triðbestu donsku deildini. Felagið staðfesti í gjár sín lut í stríðnum um uppflyting, tá teir vunnu 4-2 á heimavølli móti eykaliðnum hjá AGF. Fyrrverandi landsliðsleikarin Julian Johnsson er liðskipari hjá Svendborg, og hann var eisini á vøllinum í dag. Dysturin tóktist avgjørdur eftir lítlari løtu, tí longu eftir 17 minuttum var heimaliðið á odda 3-0. AGF stríddi seg tó aftur í dystin, men Jesper Rasmussen tók seinastu luftina úr gestunum við máli til 4-2 í seinastu minuttunum.

## Hargreaves skurðviðgerast

Enski landsliðsspælarin, Own Hargreaves, skal nú skurðviðgerast í knænum, eftir at hann hevur havt áhaldandi trupulleikar við knænum. Læknar hava roynt at fingið bilbukt við skaðanum við sproytum, men tað hevur ikki hjálpt. Hargreaves hevur bruna í knænum, og nú skal hann leggjast undir skurð. Roknað verður við, at Hargreaves má halda frí frá fótbólti í eitt hálvt ár.

# Veldug fótbóltsveitsla



*Nøkur av teimum, sum vórðu kosin tey bestu í nú farna kappingarárinum*



*Til samans var talan um væl omanfyri 100 fólk, sum høvdu leitað sær í Miðlahúsið fríggjadagin*



*Fríðrún Danielsen úr Skála vann heiðurin sum ársins stjørnuskot hjá kvinnum*

**Miðlahúsið var stúgvandi fult av fólki, tá seinasta punktum varð sett fyri fótbóltsárinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Arnbjørn T. Hansen og Heidi Sevdal vóru bestu fótbóltsspælararnir í føroysku kappingini í 2008. Tað var seinasta niðurstøðan, sum varð gjørd í Miðlahúsinum fríggjakvøldið, har fótbóltsfólk úr øllum landinum vóru komin at seta eitt rimmar punktum fyri kappingarárinum.

Í mun til undanfarin ár, tá skipað varð fyri gallakvøldum, hevði kvøldið hesa ferð broytt navn til fótbóltsveitsla.

Tað merkti millum annað, at talan var um standandi buffet og fría barr, og saman við væl oman fyri 100 væl uppløgdum veitslugestum borgaði hetta fyri einum kvøldið, har fótbólturin var í fokus, men har vinarlag, fótbóltsprát og hugni skaptu karmarnar kring kvøldið.

Hæddarpunktini vóru sjálvandi, tá ymsu handanirnar vóru á skránni, men hóast tað sjálvandi vóru tey fáu, sum sluppu upp á pallin at taka ímóti gávum, so mundu tey flestu í Miðlahúsinum kenna seg sum vinnarar.